

FØROYA
ARBEIÐSGEVARAFELAG

# Ársfrásøgn

Juni 2023

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Innihaldsyvirlit

**Frágreiðing frá nevndini . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4**

**Farna árið við samráðingum og tiltøkum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6**

Privati arbeiðsmarknaðurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
Samráðingarrundan 2022–2024 . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
Sáttmálin við maskinmeistarar á landi. . . . . . . . . . . . 6
Sáttmálin við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
Sáttmálin við Føroya Flogteknikarafelag. . . . . . . . . . 6
Sáttmálin við Súluna. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
Sáttmálarnir við Føroya Tele og Posta . . . . . . . . . . . . 6
Semja um yvirtøku av sáttmála á Vága Floghavn . . . 7
Sáttmálarnir við manningarfeløgini . . . . . . . . . . . . . . 7
Sáttmálin við Finansforbundet . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
Sáttmálin við Samverk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
Sáttmálin við Grafiska Yrkisfelagið . . . . . . . . . . . . . . . 7
Sáttmálin við Føroya Flogskiparafelag. . . . . . . . . . . . 7
Sáttmálin við YTF. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
Semja við YTF um Elektron . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
Komandi sáttmálasamráðingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
Vinnudagurin 2022. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
SMS Ársins Virki 2022 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
TROM ársins Vinnuátak 2022 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
Dagførd vinnusjónarmið. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .10
Nýggj orkusjónarmið. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .10
Burðardygd verður raðfest hægri . . . . . . . . . . . . . . . . .10
Kunningartiltak í Klaksvík. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .10
Ferðavinnustevnan 2022 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .11
Løgtingsvalið 2022 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .11
Kunning fyri ukrainskum flóttum . . . . . . . . . . . . . . . . .11
Kunning um útlendska arbeiðsmegi . . . . . . . . . . . . . . .11
Aliráðstevnan 2023 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .11
Nevndarlimir hittust í Vinnuhúsinum . . . . . . . . . . . . . .12
Seafood Expo Global í Barcelona . . . . . . . . . . . . . . . . .12
Onnur tiltøk í farna ári. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .12

**Farna árið í vinnuni og útlit . . . . . . . . . . . . . . 13**

Príshækkingar viga tungt í vøkstrinum. . . . . . . . . . . . .13
Prísvøksturin hevur gagnað føroyska útflutninginum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .13
Príshækkingarnar merkja føroyska gerandisdagin. . .14
Byggivinnan nógv at gera. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .15
Ferðavinnan komin aftur á beint . . . . . . . . . . . . . . . . .16
Útlitini framvegis merkt av óvissu . . . . . . . . . . . . . . . .17

**Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag . . . . . . . . . . . . . . 18**

Raðfestingar og rationaliseringar. . . . . . . . . . . . . . . . . .18
Haldføri í búskapin. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .19
Manglandi arbeiðsmegi er ein áhaldandi avbjóðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .19
Strika serskipanir til føroyska arbeiðsmegi uttanlands . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .19
Arbeiðsvikan er eitt mál fyri partarnir á arbeiðsmarknaðinum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .20
Íløgur og viðlíkahald . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .20

**Føroya Arbeiðsgevarafelag . . . . . . . . . . . . . . 21**

Limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag . . . . . . . . . . . . . . . . .21
Uppgávur og endamál hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .21
Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag . . . . . . . . . . . . . . .23
Føroya Arbeiðsgevarafelag takkar Boga fyri tíðina í nevndini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .24
Vinnuhúsið. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .25



# Frágreiðing frá nevndini



**Jón Sigurdsson**
Nevndarformaður

Hesi seinastu nógvu árini hevur stór framgongd verið í føroyska samfelagnum, og hóast búskaparliga ferðin møguliga hevur verið í hægri lagi, so liggur nógv eftir, og tí hava vit í dag eitt vælútbygt og nýmótans føroyskt samfelag á øllum økjum.

Framgongdin í samfelagnum og menningin av vinnuni ganga hond í hond, og føroysk vinna bjóðar seg nú fram á so at siga øllum økjum, bæði her heima og á altjóða pallinum, har vit nú kunnu bjóða okkum fram við førleikum innan t.d. sjúkrahús-, skúla-, flogvalla-, tunnils- og aðrar størri og smærri fakliga krevjandi uppgávur, sum vit hava nomið okkum á føroyska heimamarknaðinum.

Førleikarnir í føroysku vinnuni kunnu tí næstan samanberast við Føroya Symfoniorkestur og Føroyska Hondbóltslandsliðið, har tað javnan verður sagt, at vit eru ov fá í tali, og tað eigur tí ikki at bera til at hava eitt føroyskt symfoniorkestur og eitt føroyskt hondbóltslandslið, sum kvalifiserar seg millum stóru tjóðirnar í altjóða hondbóltskapping, men vit gera tað kortini.

Hesi viðurskifti hava stóran týdning hjá politisku skipanini at hava í huga, tí nú skapar føroysk vinna arbeiðspláss á privata arbeiðsmarknaðinum til fólk við serligum førleikum og longri akademiskum útbúgvingum. Her er talan um nógvar føroyingar, sum áður hava verið noyddir at leita sær størv uttanlands. Hesir føroyingar hava nú havt møguleikar at koma til Føroyar at starvast og menna, bæði sínar førleikar, men eisini førleikararnar og vitanarstøðið í føroysku vinnuni, til frama fyri føroyskan útflutning á fleiri økjum, sum vit ikki hava sæð áður. Í hesum sambandi hevur tað stóran týdning, at vit menna samstarvið millum føroyskar útbúgvingarstovnar og føroyska vinnu, so vit gerast enn dugnaligari at lofta teimum avbjóðingum, ið vit sum vinna og samfelag hava og fáa komandi árini.

Í løtuni er støðan spent í heimssamfelagnum, og hetta rakar eisni føroyska samfelagið. Fyri gott trimum árum síðan stongdi næstan alt heimssamfelagið niður yvir nátt, tá umfatandi tiltøk vórðu sett í verk fyri at forða koronasmittuni at spjaða seg. Tá so samfeløgini spakuliga byrjaðu at lata upp aftur, rendu vit okkum inn í stórar veitingartrupulleikar við skjótt vaksandi



orku- og oljuprísum. Hetta skapti eina skjótt vaksandi inflasjón, sum miðbankarnir hava roynt at bart niður aftur við at hækka renturnar. Omaná á alt hetta kom so russiska innrásin í Ukraina.

Útlitini eru tí óviss í løtuni, men føroyska samfelagið skal kortini útbyggjast og mennast frameftir, og her vónar Føroya Arbeiðsgevarafelag, at føroyskir politikarar brúka førleikarnar í føroysku vinnuni, áðrenn teir hyggja aðrastaðni. Hetta hevur stóran týdning fyri víðari menningini av føroysku vinnuni, tí tað kann vera langt millum tær stóru og mest fakliga krevjandi verkætlanirnar í Føroyum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vil í hesum sambandi eisini mæla politisku skipanini til at raðfesta viðlíkahald og dagføring av almennum ognum hægri. Tað snýr seg ikki bara um at byggja nýtt. Viðlíkahald er ein náttúrligur partur av allari nýbygging, og viðlíkahald er við til at skapa støðugt virksemi kring alt landið. Á burðardygga økinum kann tað almenna eisini taka risafet við at dagføra almennar ognir til nýggjastu umhvørviskrøvini.

Óvissan og serliga inflasjónstrýstið hevur merkt samráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum hesa samráðingarrundina, sum hevur ført til ein hægri útreiðslukarm, um samanborið verður við seinnu árini. Samlaði karmurin hetta tvey ára sáttmálaskeiðið var 3,80% fyrra árið og 4,04% seinna árið.

Henda samráðingarrundan hevur eisini verið avbjóðandi í aðrar mátar. Samráðingarnar við Flog-skiparafelag Føroya vístu seg at verða serliga drúgvar og endaðu við, at semingsmaðurin varð tilkallaður. Eftir at hava lagt tvey semingsuppskot fyri partarnar, sum flogskiparafelagið vrakaði, endaði semingsmaðurin semingsroyndirnar og Føroya Arbeiðsgevarafelag lýsti verkbann við 14 daga varsli.

Eftir at verkbannið var lýst, varð eitt nýtt semings-uppskot sent limunum í flogskiparafelagnum til atkvøðugreiðslu. Ein stórur meiriluti av limunum í flogskiparafelagnum tók undir við hesum semingsuppskotinum, og sáttmáli varð tí undirskrivaður og verkbannið varð avlýst.

Í november 2022 varð løgtingsval útskrivað, og Vinnuhúsið var beinanvegin klárt við filmum og greinum á heimasíðu og Facebooksíðu, har arbeiðs-gevarar og vinnugreinafeløgini í Vinnuhúsinum løgdu fram síni sjónarmið og valynski til politisku umboðini, sum bjóðaða seg fram at stjórna landinum eftir valið. Innsløgini við sjónarmiðunum frá vinnuni eydnaðust sum heild væl og løgdu upp til nógvar viðmerkingar og kjak í almenna rúminum. Harumframt vóru fundur í Vinnuhúsinum við einstøku flokkarnar við framløgum av valynskjunum frá vinnuni.

Valynskini frá vinnuni eru í prinsippinum grundað á vinnusjónarmiðini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, ið vórðu givin út í dagførdari útgávu, stutt fyri, at løgtingsvalið varð útskrivað.

Endamálið við vinnusjónarmiðunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at vera vegvísari fyri vinnuna í politisku stýringini av samfelagnum, soleiðis at politiska skipanin kann geva vinnuni best møguligar karmar at skapa vøkstur og virðisøking í føroyska samfelagsbúskapinum. Vinnusjónarmiðini eru grundað á varandi gagnnýtslu av tilfeingi, har kapping og kappingarføri er drívmegin og reyðu tráðurin fyri alt vinnuligt virksemi.

Í hesum sambandi kann nevnast, at avbjóðingin við at útvega arbeiðsmegi framvegis er ein tann størsta forðingin hjá føroyskari vinnu fyri framhaldandi vøkstri. Samstundis arbeiðir henda samgongan við ætlanum um at stytta arbeiðsvikuna við lóg. Her er prinsipiella støðan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, at arbeiðsvikan og øll onnur líknandi viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum eiga at verða skipaði við samráðingum og avtalum millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur avgjørt at raðfesta burðardygd enn hægri framyvir og hevur tí sett ein ráðgeva í starv innan burðardygd. Uppgávan hjá ráðgevanum verður at menna arbeiðið við burðardygd hjá limafyritøkunum í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag sær burðardygd sum eitt strategiskt týdningarmikið øki fyri lima-fyritøkur, og ynskir tí at stuðla limunum í tí megnar-taki tað er at seta sær mál fyri og skjalprógva burðar-dygdina í virkseminum.

Tórshavn, tann 2. juni 2023

**Jón Sigurdsson**
Nevndarformaður

# Farna árið við samráðingum og tiltøkum

**Føroya Arbeiðsgevarafelag brúkar nógva orku til samráðingar og ymsar spurningar um sáttmálaviðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum. Soleiðis var eisini í undanfarna ári, men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur eisini havt nógv annað á skránni hetta seinasta árið.**

## Privati arbeiðsmarknaðurin

Føroya Arbeiðsgevarafelag, við undirfeløgum tess, varðar av øllum sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum á landi umframt sáttmálunum fyri handilsskip. Størsta sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjari nýggjari samráðingarrundu, og leggja hesar støðið undir øllum sáttmálunum í runduni.

### Samráðingarrundan 2022-2024

Nýggja samráðingarrundan fyri sáttmálaskeiðið 2022-2024, byrjaði við, at Føroya Arbeiðsgevarafelag í mai 2022 undirskrivaði nýggjar sáttmálar við tey fimm arbeiðarafeløgini. Samlaði karmurin hetta tvey ára sáttmálaskeiðið er 3,80% fyrra árið og 4,04% seinna árið, og hesin karmurin er hildin í øllum sáttmálunum í hesi samráðingarrunduni.

### Sáttmálin við maskinmeistarar á landi

Fríggjadagin 17. juni 2022 varð semjan undirskrivað við Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar á landi. Umframt lønarhækking vóru aðrar broytingar í sáttmálanum, eitt nú tillagingar í lønartalvuni og orðing um ser-og eginavtalur

### Sáttmálin við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna

Føroya Arbeiðsgevarafelag og handverkarafeløgini gjørdu nýggjar tvey ára sáttmálar í oktober 2022.

Nýggjar reglur fyri viðbøtur fyri starvsaldur vóru somuleiðis avtalaðar, soleiðis at handverkarar fáa starvsaldurstrinini 2, 4, 6, 8, 10 og 11 inn í sáttmálan.

Nýggi sáttmálin er galdandi frá 1. oktober 2022 til 1. mai 2025, tað er 2 ár og 7 mánaðir.

### Sáttmálin við Føroya Flogteknikarafelag

Tað eru Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag, sum gera sáttmála fyri flogmekanikararnar við Føroya Flogteknikarafelag og Føroya Handverkarafelag. Í oktober 2022 var nýggur sáttmáli avtalaður, galdandi frá 1. oktober 2022 og tvey ár fram.

### Sáttmálin við Súluna

Fríggjadagin 11. november 2022 skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Súlan undir nýggjan tvey ára sáttmála. Nýggi sáttmálin merkir, at eftirlønin hækkar 4% tann 1. november 2022, og blokkarnir og grundlønin hækka 0,6%. Tann 1. november 2023 hækkar grundlønin og blokktímar við 4,04%. Harumframt vóru eisini aðrar tillagingar gjørdar í sáttmálanum.

### Sáttmálarnir við Føroya Tele og Posta

Mánadagin 12. desember 2022 skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsfelagið undir nýggjar tvey ára sáttmálar fyri Føroya Tele og Posta. Sáttmálin er frá 1. januar 2022 til 1. januar 2024.

Umframt lønarhækking vóru partarnir samdir um, at frá 1. januar 2023 verður eftirløn latin av úrtíðarløn, umframt at aðrar tillagingar eru gjørdar í sáttmálatekstinum.

### Semja um yvirtøku av sáttmála á Vága Floghavn

Hósdagin 2. juni 2022 skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsfelagið undir nýggjan kollektivan sáttmála fyri sløkkiliðsfólkini hjá Vága

Floghavn. Sáttmálaviðurskiftini fyri sløkkiliðsfólk vóru frammanundan skipað eftir avtalu millum Vága Floghavn og danska fakfelagið HK.

Hóast flogvøllurin varð yvirtikin sum føroyskt málsøki í 2007, so hava sáttmálaviðurskiftini ongantíð verið yvirtikin á føroyskar hendur. Arbeitt hevur verið við at yvirtaka sáttmálaøkið í longri tíð, og við hesi avtalu eru partarnir loksins komnir á mál.

## Sáttmálarnir við manningarfeløgini

Fríggjadagin 17. februar 2023 skrivaði Reiðarafelagið fyri Handilsskip undir semju við Maskinmeistarafelagið og Fiskimannafelagið og tann 7. mars 2023 skrivaði felagið undir semju við Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Talan er um nýggjar tvey ára sáttmálar.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip hevur 6 sáttmálar við Maskinmeistarafelagið og Fiskimannafelagið. Við hvørt felag er ein høvuðssáttmáli og tveir sersáttmálar fyri frálandaskip.

## Sáttmálin við Finansforbundet

Fríggjadagin 14. apríl 2023 varð semja undirskrivað millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Finansforbundet um nýggjan tvey ára sáttmála fyri starvsfólk, sum starvast í BankNordik, Trygd og Skyn. Sáttmálaskeiðið er frá 1. mai 2023 til 1. mai 2025.

## Sáttmálin við Samverk

Fríggjadagin 28. apríl 2023 varð skrivað undir nýggjan tvey ára sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Samverk, galdandi frá 1. mai 2023 til 1. mai 2025.

Umframt lønarhækking vóru partarnir samdir um nýggja áseting í sáttmálanum, sum sigur, at fastlønt hava rætt til at keypa eina viku frí um árið.

## Sáttmálin við Grafiska Yrkisfelagið

Fríggjadagin 28. apríl 2023 skrivaðu Føroya Prentsmiðjufelag og Grafiska Yrkisfelagið undir nýggjan tvey ára sáttmála. Sáttmálaskeiðið er frá 1. mai 2023 til 1. mai 2025.

## Sáttmálin við Føroya Flogskiparafelag

Samráðingarnar við Flogskiparafelag Føroya vístu seg at verða serliga drúgvar hesuferð og endaðu við, at semingsmaðurin varð tilkallaður. Eftir at hava lagt tvey semingsuppskot fyri partarnar, sum flogskiparafelagið vrakaði, endaði semingsmaðurin semingsroyndirnar og Føroya Arbeiðsgevarafelag lýsti verkbann við 14 daga varsli.

Eftir at verkbannið var lýst, varð eitt nýtt semingsuppskot sent limunum í flogskiparafelagnum til atkvøðugreiðslu. Ein stórur meiriluti av limunum í flogskiparafelagnum tók undir við hesum semingsuppskotinum, og sáttmáli varð tí undirskrivaður og verkbannið avlýst.

## Sáttmálin við YTF

Mánadagin 15. mai 2023 varð semja undirskrivað millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og YTF um nýggjan tvey ára sáttmála fyri starvsfólk í tryggingarfeløgunum og peningastovnunum, undantikið Bank Nordik, Trygd og Skyn, sum undirskrivaðu sáttmála við Finansforbundet 14. apríl í ár, sí sáttmálan við Finansforbundet á síðu 7.

Umframt lønarkarmin vórðu partarnir samdir um at fara undir arbeiðið at skilja sáttmálan sundur fyri peningastovnar og tryggingarfeløg í hesum sáttmálaskeiðnum. Sáttmálaskeiðið er frá 1. mai 2023 til 1. mai 2025.

## Semja við YTF um Elektron

Týsdagin 23. mai 2023 varð semja undirskrivað við YTF um nýggjan tvey ára sáttmála fyri Elektron. Sáttmálaskeiðið er frá 1. juni 2023 til 1. juni 2025.

## Komandi sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir, ið eftir eru at samráðast um í hesi samráðingarrunduni, ganga út sum víst niðanfyri.

| | |
|---|---|
| 1. nov 2023 | Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk |
| 1. mai 2024 | Sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini ganga út - Nýggj samráðingarrunda byrjar |

# Vinnudagurin 2022

Vinnuhúsið hevur skipað fyri árliga Vinnudegnum 22 ár út í eitt, við einum undantaki. Tað var í 2020, tá koronaavmarkingarnar høvdu við sær, at Vinnudagurin varð avlýstur. Í fjør var Vinnudagurin fríggjadagin tann 30. september í Norðurlandahúsinum.

Umframt fleiri áhugaverdar fyrilestrar, so vórðu Ársins Virki og Vinnuátakið kosin.

## SMS Ársins Virki 2022

Dómsnevndin grundgav soleiðis fyri at velja SMS til Ársins Virki 2022.

Tað kann vera langt úr Føroyum út í heim. Tað er ein av fortreytunum fyri at liva og virka avbyrgt úti í Norðuratlantshavinum. Hættar tú tær hinvegin at hugsa stórt, kennir rákið í tíðini, dugir at taka við útlendskum




íblástri, og samstundis halda fast um føroyska upprunan og eyðkenni, kanst tú bróta upp úr nýggjum og toga útheimin nærri Føroyum og føroyingum. Tað krevur treiskni, hegni og vítt útsýni.

Sjeytiárini vóru hendingarík í Føroyum. Vit trinu inn í eitt nýtt og øðrvísi tíðarskeið. Fjarstøðan millum okkum sum fólk minkaði í stórum. Tunlar vóru boraðir, vegir vóru asfalteraðir og havnir vóru bygdar. Vit fingu framkomin strandfaraskip, og brúgvin um Streymin bant størstu oyggjarnar í landinum saman.

Men fjarstøðan millum okkum og umheimin minkaði eisini. Í 1977 vuksu Føroyar - bókstaviliga. Fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar, og tað kollvelti veiðumynstrið hjá føroyingum. Samstundis vaks sjónarringurin hjá føroyingum. Ein orsøk var, at í einum føroyskum bygningi var portur latið upp til fremmand lond og fremmandar marknaðir.

Høgt til loftið og vítt til veggja, siga vit, tá ið tað er nógv og gott rúm inni. Í fluttari merking er tað eisini at vera savnandi og duga at fevna øllum. Øllum tørvum og øllum aldursbólkum. Børnunum, ungdóminum, foreldrunum, ommunum og abbunum.

Ársins virki megnar bæði. At fevna øllum og toga útheimin nærri Føroyum. So at siga allir føroyingar hava okkurt tilknýti til fyritøkuna. Ikki bara tað, vit hava keypt, men eisini eitt minni ella onkra uppliving.

Stavnhaldið hevur allatíðina verið at hugsa og tillaga rembingarnar úti í heimi sum ein samrunnan part av føroyskum vinnulívi. Tað er av somu orsøk einki løgið í, at virkið gerst støðugt meira grønt og kýtir seg fyri at vísa størri fyrilit fyri umhvørvinum. Arbeitt verður miðvíst við at avmarka spill, og gomlu køliskipanirnar verða skiftar út í stigum. Seinastu árini eru partar av virkseminum eisini knýtt upp í fjarhita, jarðhita og sjóhita.

Vit vita, at í Føroyum kann vera torført at broyta gamlar siðir, men onkur skal gera tað. Fyritøkan er eisini síðan fyrsta dagin farin upp trappurnar og hevur samstundis hugt frameftir og uppeftir. Góða rákgongdin sæst aftur í teimum árligum roknskaparritunum. Drívmegin hevur verið, at onkur noyðist út um trøðna – út um teir miklu og tryggu garðarnar í Føroyum – fyri at fáa greiðu á, hvørjar perlur goyma seg har. Tú veitst tað kanska ikki, men í Havn fóru tey also at drekka caffe latte fyri 40 árum síðan. Longu í áttatiárunum kundu føroyingar drekka italskt espressobaserað kaffi við heitari mjólk undir føroyskum taki í hugnaligum og heimligum umhvørvi.

Handlar eru komnir og farnir, men fyritøkan hevur støðugt megnað at vera ein savnandi og lívligur depil við breiðum, dagførdum og forvitnisligum vøruúrvali. Samtakið leggur eisini javnan karmar til fjølbroyttar upplivingar, har ein breiður skarði av fólki, ung og eldri úr øllum samfelagsbólkum, savnast um einstøk tiltøk. Har er gott pláss og ókeypis atgongd til tónleikaframførslur, framsýningar, kappingar og spæliland. Tí – sum tey siga – hví skal tað ikki vera eitt upplivilsi at fara til handils?

Høvuðsbygningurin – sermerkti neystakendi bygningurin - er trífaldaður í vavi, síðan dyrnar lótu

upp í 1977, og virksemið er við tíðini vaksið út um bæði húsið og býin. Kring alt landið eru handlar, sum samtakið eigur og rekur, og tað eru nú okkurt um 85 túsund kundar, ið keypa gerandisvørur frá samtakinum um vikuna.

Fyri fimtan árum tók annað ættarlið við, tá ið sonurin tók við sum stjóri eftir pápan, og har hevur hann útvið 700 fólk á lønarlistanum, svarandi til 275 ársverk. Har arbeiða skúlaungdómar, handilsfólk, handverkarar, bakarar, kokkar og slaktarar.

Samtakið eigur og rekur í alt 13 handlar, sum selja húsarhaldsvørur. Samtakið eigur eisini fimm matstovur, umframt at vera partaeigari í venjingarmiðstøð og øðrum handlum.

Samtakið hevur eisini við einum greiðum málpolitikki í lýsingum slóðað fyri góðum og livandi føroyskum handilsmáli. Frá fyrsta degi, langt áðrenn enskt av álvara troðkaði seg inn í orðasavnið hjá føroyingum, og langt áðrenn, at føroyingar vistu, hvat tað var at skriva stutt og kubbut sms-boð á einari fartelefon, legði samtakið seg eftir at snøgga føroyska handilsmálið.

Burturúr samtakinum spratt eisini nýtt orðafelli um aldarskiftið, sum hevur fingið innivist í føroyskari tiltaksorðabók við orðafellum og máliskum.

Tí hvat spyrja vit ofta fólk, sum ikki lata hurðina aftur? Vit spyrja, um tú er fødd í SMS.

Góðu fíggjarligu úrslitini og atliti til sosiala og umhvørvisliga burðardygd eru høvuðsorsøkin til, at ein samd dómsnevnd hevur valt P/F SMS sum Ársins Virki 2022.

## TROM ársins Vinnuátak 2022

Dómsnevndin grundgav soleiðis fyri at velja TROM til Vinnuátakið 2022.

Í teimum dramatisku steyrrøttu føroysku bjørgunum við ríka og fjølbroytta fuglalívinum, bølir bøgan, meðan fuglaungin búnast sum blomman í egginum. Stutt eftir krossmessu brestur fyri nev. Við lítla nevinum trýstir hann hol á eggjaskalið og dregur sín fyrsta andadrátt úr kalda luftrúminum. Hann rembast síðan inni í egginum til tað umsíðir brotnar.

Útkomin er stákan á rókini. Ungin trilvar seg fram í blindum, hjálparleysur og nakin, og reiðrið kennist av góðum grundum bæði fjálgt og lýtt, tá ið foreldrini eftir tørni koma við fongi. Tá gapar pisunevið. Reiðurfastur veksur hann skjótt, hann verður fjarðaður, og fær hann nógmikið at eta, kann hann sum oftast vera fullvaksin eftir nakrar vikur.

Tað kann vera strígguð at fara av ytstu rókini, men lukkast tað at fara flagsandi úr berginum og út á tann stóra sjógvin, er fuglaungin sjálvbjargin. Hann er floygdur, tá ið fyrstu frælsu veingjatøkini eru tikin, og í harðbalna føroyska landslagnum í blíðu summarnáttini



er frítt útsýni og ótaldir møguleikar at finna flogið og skapa sær tilveruna. At skapa sær sína egnu søgu.

Tað er í ávísan mun eisini søgan um skapandi vinnurnar í Føroyum. Leingi var eitt stórt og ov lítið troytt tilfeingi í teimum skapandi vinnunum, men nú hendir nakað. Fleiri hugskot verða til veruleika, sum fáa meira burtur úr stóra tilfeinginum, sum vit eiga í Føroyum.

Skapandi vinnur eru vinnur, sum hava eitt mentanarligt og skapandi grundarlag. Rávøran er eginleikin at hugsa, skapa og endurskapa. Í teimum skapandi vinnunum ganga list, mentan, tøkni og vinna saman, sum í síni heild kunnu vaksa um føroyska búskapin, menna føroyska mentan og styrkja okkara samleika.

Góðu hugskotini spretta allastaðni og allatíð. Hugskotið til ársins vinnuátak birtist brádliga í knokkinum á einum 16 ára gomlum dreingi, einum íverkseta, sum stóð við flakalinjuna á fiskavirkinum í Norðagøtu fyri nógvum árum síðan. Tað gingu meira enn 10 ár, áðrenn hugskotið var so mikið búgvið, at hann fór at ráðføra seg og samstarva við onnur um at fullføra verkætlanina. Tey hugsaðu stórt, og ambitiónirnar vóru øgiligar.

Í morgin fara vit inn í oktober mánaða - tann gráa oktober – sum plagar at vera merktur av køldum og

vátum heystarveðri. Men skapa og bróta upp úr nýggjum kanst tú alt árið. Skapandi vinnurnar lata seg ikki tarna av veðrinum. Tær skapa allatíð – og tær skapa eisini áhuga fyri Føroyum sum land, sum ger tað lokkandi hjá einstaklingum og fyritøkum at liva og virka her.

Fleiri skapandi vinnur hava tikið skarvslop seinastu árini. Filmsvinnan er ein. Í mong ár hava eldsálir virkað fyri at menna Føroyar sum filmsland, og evnarík fólk eru í holt við at skapa eitt føroyskt filmsmál og skapa filmssøgur í føroyskum umhvørvi við føroyskum innihaldi.

Tað hevur leingi verið greitt fyri øllum, at við røttu kørmunum kunnu Føroyar mennast í stórum sum filmsland. Bæði føroyskir leikstjórar og sjónleikarar fáa við stuttfilmum og spælifilmum viðurkenning úti í heimi. Ávirkanin av filmsverkætlanunum út í samfelagið er eisini stór við við øllum frá gisting, umbygging, flutningi og mongum øðrum, sum í síni heild eru við at fjøltátta føroyska búskapin. Føroyar eru samstundis vorðnar enn meira sjónligar sum ferðavinnuland. Eitt dømi er gravgangurin eftir at vitja gravsteinin hjá James Bond á Kallinum.

Føroysk filmsvinna rakk hæddini í vetur, tá føroysk filmsverkætlan var ferðabúgvin og tveitti seg av tromini við okkara higartil størstu filmsframleiðslu. Fleiri av okkara bestu fólkum – søguskrivarar, filmsframleiðarar, fotografar, ljóðfólk og sjónleikarar – vóru bulurin, tá føroysk skaldsøgurøð var samanskrivað og pallsett sum sjónvarpsrøð við góðum stuðli úr útlondum.

Føroyskt drama kom á heimskortið. Viðurkendar stroymingartænastur og sjónvarpsrásir hava keypt rættindini at vísa sjónvarpsrøðina, sum eisini hevur verið í uppskoti til viðurkendar virðislønir. Søgurnar um váttliga journalistin Hannis Martinsson, sum føroyskur rithøvundur upprunaliga skrivaði á føroyskum til ein føroyskan lesaraskara, eru við góðum úrsliti fluttar á stóru løriftini úti í heimi.

Hugsa, skapa og endurskapa. Og sum áhaldnu ábyrgdarmenninir siga, so er hetta frambrotið bara byrjanin. Filmsvinnan roynir nú at finna flogið.

Ein samd dómsnevnd hevur valt sjónvarpsrøðina TROM sum ársins vinnuátak.

## Dagførd vinnusjónarmið

Á vinnudegnum 2022 vórðu dagførdu vinnusjónarmiðini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag løgd fram. Endamálið við vinnusjónarmiðunum er at vera vegvísari fyri vinnuna í politisku stýringini av samfelagnum, soleiðis at politiska skipanin kann geva vinnuni best møguligar karmar at skapa vøkstur og virðisøking í føroyska samfelagsbúskapinum. Vinnusjónarmiðini eru grundað á varandi gagnnýtslu av tilfeingi, har kapping og kappingarføri er drívmegin og reyðu tráðurin fyri alt vinnuligt virksemi.

Vinnusjónarmiðini eru givin út, bæði sum webútgáva á heimasíðuni hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag www.industry.fo og sum pappírsútgáva í einum lítlum bóklingi.




## Nýggj orkusjónarmið

Føroya Arbeiðsgevarafelag gav í september 2022 út nýggj orkusjónarmið, hvussu vit best seta ferð á eitt grønt, effektivt og trygt orkuskifti til orkuframleiðslu úr varandi orkukeldum. Orkusjónarmiðini kunnu finnast á heimasíðuni hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag www.industry.fo

## Burðardygd verður raðfest hægri

Føroya Arbeiðsgevarafelag fer at raðfesta burðardygd enn hægri framyvir og hevur tí sett ráðgeva í starv innan burðardygd. Uppgávan hjá ráðgevanum verður at menna arbeiðið við burðardygd hjá limafyritøkunum í Føroya Arbeiðsgevarafelag og Vinnuhúsinum annars. Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag sær burðardygd sum eitt strategiskt týdningarmikið øki fyri sínar limafyritøkur, og ynskir tí at stuðla limunum í tí megnartaki tað er at seta sær mál fyri og skjalprógva burðardygdina í virkseminum. Vinnuhúsið hevur í hesum sambandi skipa fyri 4 workshops um burðardygd í farna árinum.

## Kunningartiltak í Klaksvík

Í oktober 2022 skipaði Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri kunningartiltaki í Finastøðini í Klaksvík. Á skránni vóru tvær framløgur, har tann fyrra snúði seg um lønar- og setanarviðurskifti og tann seinna um burðardygga rákið og ymsu krøvini til fyritøkurnar í hesum sambandi. Umboðini fyri Vinnuhúsið nýttu eisini høvið at vitja fleiri vinnufyritøkur í norðurøkinum hesar tveir dagarnar, Vinnuhúsið helt til í Finastøðini í Klaksvík.

## Ferðavinnustevnan 2022

Í november 2022 skipaði Ferðavinnufelagið fyri árligu ferðavinnustevnu. Nógv fólk vóru til ferðavinnustevnuna, sum varð hildin á Hotel Hilton Garden Inn. Á skránni vóru fyrilestrar, kjak og heiðursbrævahandan.

## Løgtingsvalið 2022

Beint eftir, at løgtingsvalið varð útskrivað í november 2022, var Vinnuhúsið klárt við m.a. heimasíðu og Facebooksíðu, har arbeiðsgevarar og vinnugreinafeløgini í Vinnuhúsinum løgdu fram síni sjónarmið og valynski til politisku umboðini, sum bjóðaða seg fram at stjórna landinum eftir valið.

Filmsbrotini og valynskini á heimasíðuni vóru soljóðandi:

- Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir kappingarføran arbeiðsmarknað
- Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir kappingarføra marknaðaratgongd
- Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir almennan eigarapolitikk settan í verk
- Ferðavinnufelagið ynskir menning av yrkisdugnaskapinum í ferðavinnuni
- Ferðavinnufelagið ynskir skipaði viðurskifti viðvíkjandi gongd í haga
- Ferðavinnufelagið ynskir, at matstovurnar sleppa at ráða yvir egnum innkeypi
- Føroya Handversmeistarafelag ynskir fleiri møguleikar at taka yrkisútbúgvingar í Føroyum
- Føroya Handverksmeistarafelag ynskir skipan til løggilding av handverksmeistarum
- Handilsvinnufelagið ynskir dagførda pantskipan til endurnýtsluíløt
- Havbúnaðarfelagið ynskir kappingarført tøkugjald
- KT-felagið ynskir KT-brúkararáð
- KT-felagið ynskir, at almennu Føroyar keypa føroyskar KT-loysnir
- Ráðgevarafelagið ynskir politiskar langtíðarætlanir
- Ráfiskarakeyparafelagið ynskir betri atgongd til rávøru
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip ynskir betri atgongd til altjóða marknaðir
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip ynskir javnbjóðis kappingartreytir á øllum økjum
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip ynskir fleiri maritimar útbúgvingar í Føroyum
- Felagið Samskifti ynskir at javnstilla føroyskt á Google
- Sjóvinnufelagið ynskir eitt føroyskt útflutningsráð

Innsløgini við sjónarmiðunum frá vinnuni eydnaðust sum heild væl og løgdu upp til nógvar viðmerkingar og kjak í almenna rúminum. Vinnuhúsið hevði harumframt fundur í Vinnuhúsinum við einstøku flokkarnar við framløgum av valynskjunum frá vinnuni.

## Kunningartiltak fyri ukrainskum flóttum

Eftir russisku innrásina í Ukraina valdu politisku myndugleikarnir í Føroyum at geva friðskjól til upp til 200 flóttafólk úr Ukraina. Fyri at hesi kundu fáa so góða byrjan sum gjørligt á arbeiðslívið í Føroyum, skipaði Vinnuhúsið saman við Reyða Krossi, Útlendingastovuni, ALS og TAKS fyri einum kunningartiltaki í Vínnuhúsinum um sáttmálaviðurskifti, skipanir á arbeiðsmarknaðinum og føroysku skattaskipanina. Í februar var eisini tiltak í Vinnuhúsinum, har Almannaverkið og Útlendingastovan greiddu føroyskum arbeiðsgevarum frá um starvsvenjingarskipan fyri ukrainskar flóttar.

## Kunning um útlendska arbeiðsmegi

Í januar í ár skipaðu Vinnuhúsið og Útlendingastovan fyri kunningarfundi fyri føroyskar arbeiðsgevarar um sáttmálaviðurskifti og lóggávu í sambandi við útlendska arbeiðsmegi.

Á kunnginarfundinum varð greitt frá, um sáttmálaviðurskifti og arbeiðsmarknaðin, og serliga um lønar- og setanarviðurskiftum á privata arbeiðsmarknaðinum. Útlendingastovan greiddi frá lóggávuni í sambandi við útlendskari arbeiðsmegi í Føroyum, og umboð frá SIRI (Styrelsen for International Rekruttering og Integration) var eisini til staðar umvegis netsamband.

## Aliráðstevnan 2023

Væl omanfyri 400 luttakarar luttóku á aliráðstevnuni, sum varð hildin á Hotel Føroyum, fríggjadagin 3. mars 2023, og ongantíð áður hevur luttakaratalið verið so stórt sum hesuferð.



Á aliráðstevnuni vóru framløgur um gongdina í føroysku alivinnuni og útlitini fyri komandi tíðina. Eisini vórðu ein røð av framløgum um tær avbjóðingar og møguleikar, sum alivinnan hevur.

Føroysku framløgurnar vórðu tulkaðar til enskt, so eisini útlendsk starvsfólk og ráðstevnuluttakarar høvdu møguleika at fylgja við.

Á Aliráðstevnuni eru eisini góðir møguleikar at netverka, og nógv nýttu møguleikan at fáa eitt prát við fólk í og kring alivinnuna.




## Nevndarlimir hittust í Vinnuhúsinum

Fríggjadagin 10. mars 2023 hittust nevndarlimir í feløgunum í Vinnuhúsinum til felags tiltak, íblástur og kjak.

Endamálið við tiltakinmum var, at nevndirnar kundu hittast at fáa íblástur, tosa um mál av felags áhuga og geva afturmelding um arbeiðið í Vinnuhúsinum. Eisini var endamálið, at nevndarlimirnir kundu hitta og práta við nevndarlimir úr øðrum feløgum í Vinnuhúsinum.

Jón Sigurdsson, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelagi, bjóðaði vælkomin og presenteraði Håkan Ericson, landsliðsvenjara, sum hevði eina framløgu við heitinum "Jaget, laget, företaget". Framløgan snúði seg um sambandið millum einstaklingar, bólkar og alla fyritøkuna, og hvat havast skal í huga fyri at fáa besta úrslitið burturúr.

## Seafood Expo Global í Barcelona

Í ár varð heimsins størsta fiskavørumessa, Seafood Expo Global, hildin í døgunum 25.–27. apríl í Barcelona. Tær flestu føroysku útflutningsfyritøkurnar av fiskavørum vóru á stóra føroyska landabásinum, sum varð vitjaður av nógvum keyparum úr øllum londum. Hetta er 29. ferðin, at messan er, og Føroyar hava verið við hvørt ár síðan 1992, tó vóru avlýsingar tvey ár á rað orsakað av korona.

Messan varð í fjør flutt úr Brússel til Barcelona, tí messan varð vorðin ov stór til umstøðurnar í Brússel. Føroyski landabásurin var í ár víðkaður til 364 fermetrar, sum er tað størsta, hann nakrantíð hevur verið, so leingi Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur samskipað básin.

Við á føroyska básinum eru Bakkafrost, Varðin Pelagic, JFK, Kósin, North Pelagic, Hiddenfjord, PRG, Landshandilin og Pelagos.

## Onnur tiltøk í farna ári

Føroya Arbeiðsgevarafelag og feløgini í Vinnuhúsinum hava harumframt skipað fyri fleiri øðrum tiltøkum síðan aðalfundin í fjør, t.d. eina røð av tiltøkum um arbeiðið við burðardygd í fyritøkum umframt fleiri tiltøk hjá einstøku vinnugreinafeløgunum í Vinnuhúsinum. Meira fæst at vita um ymsu tiltøkini í nevndarfrásøgnunum hjá einstøku vinnugreinafeløgunum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo



# Farna árið í vinnuni og útlit

**Tað hevur verið stór framgongd í føroyska samfelagsbúskapinum hesi seinastu nógvu árini og í løtuni merkja príshækkingar og óvissa støðuna og útlitini frameftir. Føroyski búskapurin er tó væl fyri og tað gongur sum heild væl í vinnuni, men vinnan merkir á atferðini hjá føroysku húsarhaldunum, at miðbankarnir royna at tálma nýtsluna við rentuhækkingum**

## Príshækkingar viga tungt í vøkstrinum

Vøksturin í føroysku bruttotjóðarúrtøkuni, BTÚ, verður mettur til 10,8% í ársins prísum í 2022, sí mynd 1. Ein rættiliga stórur partur av vøkstrinum stavar frá prísvøkstri á útfluttum fiskavørum, tí nøgdirnar lækkaðu. Sambært Hagstovu Føroya var miðal vøksturin í føroyska brúkaraprístalinum 7,7% í 2022. Reali vøksturin í føroysku bruttotjóðarúrtøkuni hevur tí helst ligið um góð 3%.

**Mynd 1: BTÚ-vøkstur í ársins prísum, 2009-2024**




*Kelda: Hagstova Føroya.*
*Viðm: Tølini fyri 2022, 2023 og 2024 eru metingar Búskaparráðsins.*

Búskaparráðið og Hagstova Føroya meta, at prísvøkstur fer ikki at hava somu ávirkan á vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuna í ár og næsta ár sum undanfarna ár. Tí verður vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni minni í 2023 og 2024 enn í 2022. Metingin er tó ikki bert grundað á lægri prísvøkstur. Búskaparráðið metir eisini, at útflutningurin verður eitt vet lægri samstundis sum almennu íløgurnar standa í stað í 2024 í mun til 2023.

Hóast miðbankarnir hava hækkað renturnar munandi og framvegis berjast við at fáa tamarhald á skjótt vaksandi inflasjónini, sum tók seg upp, tá heimssamfelagið byrjaði at lata uppaftur eftir koronastongsulin, so eru ikki tekin um afturgongd í føroyska búskapinum av tálmandi búskaparpolitikkinum hjá miðbankunum.

## Prísvøksturin hevur gagnað føroyska útflutninginum

Higartil hava príshækkingarnar úti í heimi gagnað føroyska vøruútflutninginum. Í 2022 var vøksturin í føroyska útflutningsvirðinum 22%, hóast nøgdin av fiksaútflutninginum minkaði, sí mynd 2, ið vísir útflutningin tilsamans av laksi, uppsjóvarfiski og botnfiski í 2022. Tað var serliga stóri prísvøksturin á botnfiski og alifiski, sum økti um útflutningsvirðið í 2022. Kostnaðirnir eru tó eisini øktir.

**Mynd 2: Útflutningur av fiski í 2022**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

### Laksur

Í 2022 vaks útflutningsvirðið av laksi við 1 mia. kr.



ella 24% í mun til árið fyri, og økingin kemur av prísvøkstri, tí útflutta mongdin var nærum 10% lægri í 2022 í mun til 2021.

Í ár verður tøkunøgdin av laksi væntandi góð 110 túsund tons í livandi vekt. Føroyska alivinnan hevur ætlanir um at økja munandi um framleiðsluna komandi fimm árini, og hetta fer at merkja munandi størri útflutningsnøgdir av laksi, men prísirnir fara neyvan at halda fram við at hækka í nærmastu framtíð. Metingarstovnurin Fishpool væntar, at prísirnir á laksi á heimsmarknaðinum fara at lækka eitt lítið vet í ár og meira í 2024.

Tað skal tó viðmerkjast, at alivinnan fer at endurskoða íløguætlanirnar og harvið eisini ætlanirnar um øktu framleiðsluna komnandi árini, nú Løgtingið hevur samtykt at hækka tøkugjøldini munandi.

## Uppsjóvarfiskur

Tað er framvegis eingin avtala gjørd um at sleppa inn í bretskt sjóøki at fiska makrel. Heildarkvotan er eitt vet lægri í ár enn í fjør, men væntandi verður útflutta nøgdin eitt vet størri í ár enn í fjør, tí nakað av ófiskaðum kvotum frá í fjør verða væntandi fiskaðar í ár. Nøgdirnar í 2024 verða væntandi á leið tær somu sum í ár.

Uppsjóvarvinnan hevði væntað eitt størri prísfall á sild og makreli eftir russisku innrásina í Ukraina, men tað hendi ikki. Prísurin á báðum hesum fiskasløgunum hækkaði í 2022 í mun til árið fyri. Fyri makrelin kemst hetta mest av, at uppjóvarvinnan hevur útflutt makrelin til ES-marknaðin, og hetta fer helst at halda fram í 2023 og 2024. Tí fer prísurin á makreli helst at halda sær komandi árini. Úflutningurin av svarkjafti verður væl hægri í ár enn í fjør, tí svartkjaftavkotan er hækkað munandi í ár.

## Botnfiskur

Prísirnir á botnfiski hava verið rættiliga støðugir síðan 2010, men í 2022 hækkaðu prísirnir á botnfiski nógv. Landingarvirðið á toski hækkaði nærum 35%, og á hýsu og upsa hækkaði virðið umleið 30% í 2022 í mun til 2021. Prísurin á toski og hýsu væntast at falla eitt vet í ár, fyri síðan at halda sær í 2024.

Innflutningsprísirnir av tilfari og rávørum, sum føroyska vinnan nýtir í framleiðsuni, eru eisini hækkaðir í 2022, men hesum hava høgu útflutningsprísirnir  higartil vigað upp ímóti, og tí er framvegis avlop á føroyska handilsjavnanum við vørum.

*„...vinningurin av príshækkingunum á lidnu vørunum fer at javna seg...“*

Vinningurin, sum føroyskar útflutningsfyritøkur hava havt av príshækkingunum á marknaðunum, har føroyskar fiskavørur verða handlaðar, fer helst at javna seg so hvørt vøksturin í orku- og rávøruprísunum sláa ígjøgnum í føroysku framleiðsluni. Vinningurin av príshækkingunum á lidnu vørunum fer sostatt at javna seg og fer neyvan at síggjast aftur á botnlinjuni hjá føroysku útflutningsfyritøkunum sum frálíður.

## Shipping

Føroyska shippingvinnan er fyri stóran part ein altjóða vinna, har eftirspurningurin er tætt knýttur at gongdini í altjóða konjunkturunum.

Føroyska shippingvinnan fegnast um, at føroyski handilsflotin stendur seg væl í kappingini um sjófólk, og at talið av skipum í flotanum er støðugt, men vit hava framvegis somu avbjóðing við manglandi marknaðaratgongd, um vit skulu verða kappingarfør við útlendsku kappingarneytarnar. Føroyska shippingvinnan mælir tí nýggja landsstýrinum til at fara undir arbeiðið at fáa fleiri tvískattaavtalur og avtalur um cabotagesigling.

Meira fæst at vita um føroysku shippingvinnuna í ársfrágreiðingini 2022 hjá Reiðarafelagnum fyri Handilsskip á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo




## Príshækkingarnar merkja føroyska gerandisdagin

Føroyski brúkarin og føroysku húsarhaldini hava merkt rentuhækkingar og støðugt hækkandi prísir á so at siga øllum nýtslu- og gerandisvørum seinasta tíðina. Tiltøkupeningurin er tí ikki tann sami, sum áðrenn inflasjónin og rentuhækkingarnar tóku dik á seg, og hetta merkist við sørri varsemi hjá føroysku brúkarunum. Samlaði eftirspurningurin eftir innbúgvi,

klæðum og vanligum gerandisvørum er tí minkaður, men hetta kemst eisini av broyttari atferð og eftirspurningsmynstri hjá føroysku brúkarunum, sum nú leitar efitr meira bíligum gerandisvørum.

*„...brúkarin leitar eftir meira bíligum vørum.“*

Eftirspurningurin eftir nýggjum bilum stendur ofta fyrst fyri, tá ið húsarhaldini gerast meiri varin og tillaga nýtsluna til framtíðar vónirnar. Skrásetingin av nýggjum persónbilum er tí eitt týdningarmikið lykatal, tá ið vit skulu lodda dýpið viðvíkjandi brúkaraálitinum.

**Mynd 3: Nýskrásettir persónbilar, januar-apríl, 2013-2023**




*Kelda: Akstovan.*

Skrásetingin av nýggjum persónbilum er nógv lækkað seinastu tíðina, sí mynd 3. Fyrstu fýra mánaðirnar í ár vórðu skrásettir 534 nýggir persónbilar á Akstovuni. Hetta er nakað lægri enn um somu tíð í 2015, tá ið tað vórðu skrásettir 564 nýggir persónbilar. Skrásetingin av nýggjum bilum minkaði nógv meðan koronasmittan gjørdi um seg, men kom síðan nakað uppaftur, og er nú minkað aftur.

Hvussu privata nýtslan kemur at hátta sær komandi tíðina, er ilt at siga, men handilsvinnan væntar lægri sølu komandi árið. Hetta sæst eisini aftur í nýggjastu konjunkturkanningin hjá Hagstovu Føroya.

## Byggivinnan nógv at gera

Nógv virksemið er í byggivinnuni og byggifyritøkurnar hava fullar ordrabøkur í minsta lagi tvey á fram í tíðina. Í byggivinnuni eru tað land, kommunur og tað almenna annars, sum halda eftirspurningin uppi. Bygging og umvæling av bústøðum sær harafturímóti út til at vera lakari, tí lánikostnaðir og byggitilfar er so mikið nógv dýrkað, at fólk eru vorðin afturhaldin við at byggja nýtt og at keypa sethús, sum krevja umvælingar.

Størsta avmarkingin fyri framleiðsluna í byggivinnuni er framvegis mangul uppá skikkaða arbeiðsmegi. Hetta sæst afur í gongdini í løntakaratalinum og lønargjaldingunum í byggivinnuni, sí mynd 4. Stórur vøkstur hevur veirð í løntakaratalinum og lønargjaldingunum í byggivinnuni frá 2013 til 2020, tá løngargjaldingarnar og løntakaratalið var í hæddini. Síðan 2020 hevur eitt lítið fall verið í bæði løntakaratali og lønargjaldingunum í byggivinnuni.

**Mynd 4: Løngjaldingar og løntakarar í byggivinnuni, 2010-2022**









## Ferðavinnan komin aftur á beint

Í 2022 byrjaði føroyska ferðavinnan at koma aftur á beint eftir tvey koronaár. Umsetningurin í føroysku ferðavinnuni var 900 mió. kr. í 2022. Hetta er væl hægri enn í 2019, sum var besta árið, áðrenn koronatiltøkini læstu næstan alla ferðavinnuna niður. Her skal tó viðmerkjast, at í 2022 stavar umsetningsvøksturin í føroysku ferðavinnuni frá prísvøkstri, har hægri oljuprísir hava havt við sær munandi hægri ferðaseðlaprísir.

Umsetningsvøksturin í 2022 sæst sostatt ikki aftur á botnlinjuni í føroysku ferðavinnuni, har bruttovirðisøkingin í 2022 var lægri enn í 2019. Bruttovirðisøkingin í føroysku ferðavinnuni var 421 mió. kr. í 2019 og 347 mió. kr. í 2022, sí mynd 5.

**Mynd 5: Bruttovirðisøking frá útlendskum ferðafólkum, 2011-2022.**




Fyrstu fýra mánaðirnar í ár fóru 101.723 ferðafólk um flogvøllin í Vágunum. Hetta er umleið 19% fleiri enn somu tíð í fjør, tá ið tað fóru 85.811 ferðafólk um flogvøllin. Ferðafólkatalið um flogvøllin er sostatt komið upp á nærum sama ferðafólkatalið, sum metárið 2019, tá ið tað fóru 102.882 ferðafólk um Vága Floghavn fyrstu fýra mánaðirnar av árinum, sí mynd 6.

**Mynd 6: Ferðafólk um flogvøllin, januar-apríl, 2013-2023**




## Ráðgeving, tænastur og annar ídnaður

Føroyskir byggiharrar eru dugnaligir at brúka føroyskar ráðgevar, og tí hevur nógva virksemið hesi seinastu árini, skapt stóran vøkstur og menning í føroysku ráðgevaravinnuni. Ráðgevaravinnan er ein vitanarvinna, og ráðgevaravinnan hevur tí stóran týdning fyri menningina av føroyska samfelagnum, ikki minst, tá ið tað snýr seg um burðardygd og grønu menningina. Her kundu almennu Føroyar tikið risa fet á burðardyggu leiðini við at dagført almennar ognir til nýggjastu umhvørviskrøvini.

*„...ráðgevaravinnan stóran týdning fyri burðardygga grøna menning..."*

Meira fæst at vita um føroysku ráðgevaravinnuna í Ráðgevarablaðnum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Føroyska KT-vinnan hevur verið í stórum vøkstri seinastu árini. Føroyar stevna inn í eina talgilda

framtíð, har tøknin verður ein alt meira sjónligur partur av gerandisdegnum. Eftirspurningurin eftir KT-tænastum er tí nógv øktur og fer at økjast enn meira frameftir.

Fortreytirnar fyri at føroyska samfelagið skal fáa ágóðan av talgildingini er, at uppgávurnar verða bodnar út millum føroyskar fyritøkur, soleiðis at førleikarnir at viðlíkahalda og menna talgilda infrakervið eisini eru í Føroyum í framtíðini.

Meira fæst at vita um føroysku KT-vinnuna, undir vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Føroyska samskiftisvinnan hevur merkt støðugt og vaksandi virksemi og framgongd hesi seinastu árini, bæði her heima og uttanlands. Meira fæst at vita um føroysku samskiftisvinnuna, undir "Vinnugreinafeløg", á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Annars er føroyskur ídnaður eyðkendur við einari ella fáum fyritøkum av sama slagi, t.d. matvøruframleiðarum, bryggjaríum, prentsmiðjum og framleiðarum av reingerðarevnum. Felags fyri framleiðsluna hjá føroyskum ídnaðarfyritøkum er, at tær virka í stórari og mangan ójavnari kapping við útlendskar framleiðarar, tí hesir hava í fleiri førum fría atgongd til føroyska marknaðinum, samstundis sum somu føroysk framleiddu vørurnar kunnu verða álagdar ymisk avgjøld, tá ið tær skulu seljast á marknaðunum í grannalondum okkara.

Føroysk vinna saknar tí neyðug átøk frá politisku myndugleikunum at tryggja javnbjóðis kapping millum føroyska og útlendska vinnu.

## Útlitini framvegis merkt av óvissu

Støðan er ógvuliga spent í heimssamfelagnum í løtuni, og hetta rakar sjálvandi eisini føroyska samfelagið.

Útlitini eru tí óviss, men føroyska samfelagið skal kortini útbyggjast og mennast frameftir, og her vónar Føroya Arbeiðsgevarafelag, at føroyskir politikarar brúka førleikarnar í føroysku vinnuni, tá ið ætlanir verða lagdar um at útbyggja og menna føroyka samfelagið frameftir. Hetta hevur stóran týdning fyri víðari menningini av føroysku vinnuni og førleikunum í føroyska samfelagnum, tí tað kann ofta verða langt ímillum tær mest krevjandi verkætlanirnar í Føroyum.



# Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Tilmælini frá Føroya Arbeiðsgevarafelag til politisku skipanina taka støði í føroyska samfelagnum, samstundis sum tey eru haldfør, líka mikið, hvussu konjunkturarnir hátta sær. Tilmælini eru grundaði á dagførdu vinnusjónarmiðini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Vinnupolitisku sjónarmiðini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag eru býtt upp í 10 yvirskipaði prinsipp, ið Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir politisku skipanin til at nýta sum stavnhald, tá ið avgerðir skulu takast, sum hava týdning fyri føroyskt vinnulív.

Tey 10 vinnupolitisku prinsippini eru soljóðandi:

1. Varandi gagnnýtslu av tilfeingi
2. Støðugar karmar
3. Vælvirkandi marknaðir
4. Effektiva og kappingarføra skattaskipan
5. Effektiva útlutan av rættindum
6. Góðar og viðkomandi útbúgvingar- og granskingarskipanir
7. Smidligan arbeiðsmarknað
8. Gott undirstøðukervi
9. Væl virkandi almennan geira
10. Dagførda vitan um samfelagsgongdina

Yvirskipaða málið við vinnupolitikkinum kann lýsast soleiðis: "Politiska skipanin eigur at geva vinnuni best møguligar karmar, við varandi gagnnýtslu av tilfeingi, at skapa vøkstur og virðisøking í føroyska samfelagsbú-skapinum, har kapping og kappingarføri er drívmegin og reyði tráðurin í privata vinnuliga virkseminum"

Her eru nøkur vinnupolitisk tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag til nýggju samgonguna.

## Raðfestingar og rationaliseringar

Samgongan hevur boðað frá, at tað er neyðugt við hørðum raðfestingum, fyri at fáa langtíðar javnvág á fíggjarlógini. Tað kann tykjast sjálvsagt, at tað er neyðugt við raðfestingum, tí ynskini eru altíð størri enn tað, sum møguligt er at fíggja. Tó vísir tað seg at verða torført at raðfesta í góðum tíðum, tí tað kann vera torført at fáa forstáilsi fyri, at neyðugt er við langtíðarjavnvág á fíggjarlógini. Ætlanirnar hjá samgonguni um at menna eitt fíggjarpolitiskt regluverk, sum kann skipa almenna búskapin við langtíðarjavnvág fyri eyga, eru tí vælkomnar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við, at raðfestingar verða gjørdar, men tíverri enda raðfestingarnar ofta við, at nakrar krónur verða fluttar henda og handan vegin. Tí hevði tað verið forfrískandi, um samgongan hesuferð fór meira miðvíst til verka, og byrjaði við at hyggja eftir býtinum millum alment og privat í síni heild, og hvørjar uppgávur tað almenna eigur at røkja, og hvar privati geirin heilt ella partvíst kann lyfta uppgávuna.

Næsta stig er so at gera eftirmetingar av skipan og rakstri av almenna geiranum, bæði í síni heild, og av einstøkum pørtum. Í øðrum londum er tað vanligt at gera sonevndar budgetgreiningar, har ymiskar skipanir og einstakir almennir stovnar verða greinaðir. Hetta fyri at greina, hvat fæst fyri tað játtanina, sum Løgtingið tillutar til eitt økið, og at eyðmerkja effektiviseringsmøguleikar. Tað er upplagt at lata Fíggjarmálaráðið leiða hetta arbeiðið, við luttøku av teimum ráðum og stovnum, sum greiningin snýr seg um.

Budgettgreiningar verða vanliga nýttar til at eyðmerkja effektiviseringsmøguleikar ella møguleikar at umraðfesta. Endamálið er at betra um møguleikarnar fyri, at stovnurin kann røkja sítt endamál best møguligt, og at uppgávuloysnin verður endurhugsað. Greiningarnar kanna vanliga viðurskifti sum: skipan og umskaring við onnur øki/stovnar, mannagongdir, innkeyp, talgilding, effektivitet í kjarnuuppgávum, sporføri í útreiðslum og arbeiðstíð/lønarútreiðslur.

## Haldføri í búskapin

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at raðfestingar hjá landi, kommunum og øllum øðrum almennum virksemi yvirhøvur, verður samskipað í langtíðar-ætlanir, serliga á íløgusíðuni, har yvirskipaða málið er at fáa langtíðarhaldføri í føroyska búskapin, soleiðis at vit fáa eina javna og støðuga útbygging og menning av føroyska samfelagnum, ið ikki verður so ógvisliga órógvað og nervað av stutttíðar stoytum og sveiggjum í búskapinum.

## Manglandi arbeiðsmegi er ein áhaldandi avbjóðing

Eitt stig rætta vegin at útvega arbeiðsmegi, varð tikið við nýggju fast-track skipanini í november 2021. Skipanin gevur føroyskum vinnufyritøkum betri atgongd til útlendska arbeiðsmegi frá 3. londum, umframt at skipanin styttir viðgerðartíðina og léttir munandi um umsitingina av arbeiðsloyvum.

Fast-track skipanin er komin væl við hjá føroyskum arbeiðsgevarum, men hon loysir bert ein part av avbjóðingunum við at útvega skikkað starvsfólk. Ein tann størsta avbjóðingin og forðingin fyri virkseminum hjá føroyskum arbeiðsgevarum er framvegis at útvega skikkaða arbeiðsmegi, og tí verður eisini neyðugt við øðrum tiltøkum fyri at loysa tørvin á starvsfólkum frameftir, serliga umvegis útbúgvingarskipanina.

## Strika serskipanir til føroyska arbeiðsmegi uttanlands

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at serskipanir muga strikast, ið gera okkum fátækari sum land og sum minka um føroysku vælferðina. Hóast hetta ljóðar púra sjálvsagt, hevur eingin samgonga higartil megnað at gjørt stórvegis við hetta.

Ein slík skipan er serskipanin fyri fólk, sum arbeiða uttanlands. Nærum øll, ið arbeiða uttanlands, eisini okkara fólkatingspolitikarar, kunnu fáa ein frádrátt fyri uttanlandsinntøku. Hesin frádráttur merkir, at ein persónur, ið býr í Føroyum, og sum hevur eina vanliga inntøku á uml. 30-35.000 kr um mánaðin, kann hava upp til 5.000 kr meira á kontuni eftir skatt, um hann pendlar til t.d. Noregs at arbeiða, í mun til, um hesin persónurin arbeiddi í Føroyum. Tess hægri lønin er, tess størri verður munurin.

Hetta er bæði órímiligt yvir fyri teimum løntak-arunum, sum stríðast her á landi hvønn dag, og tað minkar eisini um vælferðina, tá tað er skattaskipanin, ið avger, hvar fólk arbeiða. Í einari tíð, har vit mangla starvsfólk á føroyska arbeiðsmarknaðinum, gevur tað onga meining, at landið roynir at lokka fólk av landinum at arbeiða við einum lægri skatti sum gularót. Aðrar slíkar serskipanir eru skattaléttin til sjófólk og fiskavirkisskipanin.

Tað eigur at verða lønarinntøkan, og ikki hvar tú arbeiðir, sum avger, hvat tú rindar í skatti. Og tað eigur heldur ikki at verða munur á arbeiðsloysisskipanum frá einari vinnugrein til eina aðra.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at vit eiga at gera ein arbeiðsmarknaðarreform, har slíkar serskipanir verða strikaðar, og í staðin lækka lønarskattin hjá lág- og miðalløntum. Soleiðis tryggja vit best vælferðina í komandi árum.



## Arbeiðsvikan er eitt mál fyri partarnir á arbeiðsmarknaðinum

Spurningurin um at stytta arbeiðsvikuna var eitt av høvuðsevnunum í valstríðnum og vallyftunum hjá hesi samgonguni til løgtingsvalið hesuferð.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur víst á nøkur faktuel viðurskifti hesum viðvíkjandi, tí kjakið hevur givið eina fatan av, at føroyski arbeiðsmarknaðurin er afturúrsigldur í mun til t.d. danska arbeiðsmarknaðin, men hetta er ein beinleiðis skeiv fatan viðvíkjandi arbeiðstíð á privata arbeiðsmarknaðinum.

Tað ber illa til at sambera arbeiðsvikuna í Føroyum og Danmark, uttan at hugt verður eftir effektivari arbeiðstíð, altso arbeiðstíð uttan matar- og kaffisteðgir. Yvirskipaða reglan innan privata arbeiðsmarknaðin er, at í Danmark er arbeiðstíðin 37 tímar umframt steðgir, og í Føroyum er hon 40 tímar íroknað steðgir.

Seinnu mongu árini eru tillagingar og broytingar gjørdar umvegis kollektivar sáttmálar og siðvenjur á privata arbeiðsmarknaðinum, har matarsteðgir í flestu førum nú eru ein partur av teimum 40 tímunum. Harafturat eru ymsar siðvenjur um kaffisteðgir, har flestu fyritøkur geva starvsfólkum løn fyri antin ein ella tveir kaffisteðgir.

Flestu løntakarar á privata arbeiðsmarknaðinum í Føroyum hava sostatt ikki eina effektiva arbeiðstíð á 40 tímar, men arbeiðstíðin er longu umleið 37 tímar um vikuna ella lægri. Innan útflutningsvinnuna er t.d. vanligt at hava løntan matarsteðg umframt í minsta lagi ein løntan kaffisteðg.

Hetta vísir, at skipanin millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum virkar eftir ætlan. Partarnir hava gjørt tillagingar umvegis samráðingar og siðvenjur, og hesar hóska til tann føroyska arbeiðsmarknaðin, hóast sjálv lógin formliga sigur 40 tímar.

Tí er tað umráðandi at spurningurin um arbeiðstíð og arbeiðsvikuna í Føroyum verður viðgjørdur væl og virðiliga í trýpartasamráðingum millum tað almenna og partarnar á arbeiðsmarknaðinum, áðrenn nakrar broytingar verða gjørdar.

## Íløgur og viðlíkahald

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at viðlíkahald av almennum ognum fær hægri raðfesting í langtíðar-íløguætlanunum hjá landi og kommunum. Politiska skipanin vísir seg ofta at vera mest upptikin av at raðfesta nýíløgur, meðan viðlíkahaldi kemur í aðru røð. Viðlíkahald eigur at vera ein náttúrligur partur av øllum nýíløgum og verandi ognum hjá tí almenna. Viðlíkahalda av almennum ognum er eisini við til at spjaða alment virksemið kring alt landið.

# Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum. Fremsta uppgávan hjá felagnum er at umboða føroyskar arbeiðsgevarar mótvegis føroysku løntakara-feløgunum í lønar- og sáttmála-samráðingum, og at ráðgeva limum sínum í dagligum spurningum um ymisk sáttmála-viðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag er eisini andlitið úteftir hjá føroyskum arbeiðsgevarum í almenna rúminum.**

## Limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroyskir arbeiðsgevarar og fyritøkur kunnu vera beinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, ella umvegis arbeiðsgevarasamskipanir í teirra vinnugrein, sum eru limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Arbeiðsgevarasamskipanirnar í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru:

- Føroya Handverksmeistarafelag
- Føroya Prentsmiðjufelag
- Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Undir arbeiðsgevarasamskipanunum eru eisini lokal feløg, sum tí eisini eru óbeinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, umvegis arbeiðsgevarasamskipanirnar omanfyri.

Fyritøkur og arbeiðsgevarar, sum ikki hoyra undir virkisøkini hjá arbeiðs-gevarasamskipanunum omanfyri, eru beinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.




## Uppgávur og endamál hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Ein tann største uppgávan hjá Føroya Arbeiðs-gevarafelag er at samráðast og gera sáttmálar fyri føroysku vinnuna við løntakarafeløgini á privata føroyska arbeiðsmarknaðinum. Endamálið er at tryggja støðug viðurskifti og tálma lønarvøksturin á privata føroyska arbeiðsmarknaðinum til frama fyri føroyska kappingarførið.

Umsitingin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag veitir limunum tænastur og ráðgeving viðvíkjandi spurningum um t.d. starvsfólkaviðurskifti og leiðslu, lønarsáttmálar, lógir og reglur á vinnuøkinum o.s.fr. Umsitingin hevur harumframt tætt sambond við vinnuna í øðrum londum, og virkar tí eisini sum sambindingarlið millum føroyska og útlendska vinnu.

Ein onnur týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at umboða føroyska vinnu mótvegis føroysku myndugleikunum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er hoyringspartur hjá føroyskum arbeiðsgevarum viðvíkjandi lógum og reglum, sum politisku myndugleikarnir arbeiða við at seta í verk. Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at ávirka lógarsmíðið soleiðis, at vinnuligu karmarnir tæna og ikki darva vinnuliga virksemið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er harumframt, bæði beinleiðis og umvegis hini arbeiðsgevarafeløgini, umboðað í nógvum ymiskum stýrum, nevndum og ráðum, ið seta karmar fyri føroyska vinnu. Her gera feløgini sína ávirkan galdandi, soleiðis at

vinnusjónarmið vinna frama. Hetta skal tryggja limunum í Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað frameftir verður liviligt hjá fólki við fyritaksemi og hugskotum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag virkar eisini sum andlitið úteftir hjá limum sínum við at kunna og leggja fram sjónarmiðini hjá arbeiðsgevarasíðuni í almenna rúminum.

Felagið skipar javnan fyri størri og smærri tiltøkum fyri limir sínar, t.d. árliga vinnudagin og ymisk kunningartiltøk um broytingar í lóggávu, sáttmálum og tílíkum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag setir eisini eftir tørvi arbeiðsbólkar at greina mál og stevnur, sum ofta gerast hornasteinar í almenna vinnupolitikkinum hjá felagnum.

Meira kunning um lógir o.a. viðvíkjandi Føroya Arbeiðsgevarafelag er at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

# Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag verður vald á árliga aðalfundinum í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Í lóggávu felagsins er ásett, at nevndin skal veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber.**

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag er mannað soleiðis:



## Jón Sigurdsson

*Nevndarformaður*

Jón Sigurdsson er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Umframt at hava verið nevndarlimur í Føroya Handverksmeistarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag í mong ár, er hann eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Sigurdsson hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004, og verið nevndarformaður síðan 2022.



## Høgni Hansen

*Næstformaður*

Høgni Hansen er stjóri í heilsøluni Poul Hansen, og nevndarlimur í fleiri øðrum fyritøkum. Høgni Hansen var nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið varð avtikið. Í 2011 varð Høgni Hansen valdur í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og hevur verið næstformaður felagsins síðan tá.



## Kristoffur Laksá

*Nevndarlimur*

Kristoffur Laksá er samráðingarleiðari Føroya Arbeiðsgevarafelags. Kristoffur Laksá er eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum og sat í nógv ár í nevndini í Føroya Prentsmiðjufelag. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



## Jóhanna á Bergi

*Nevndarlimur*

Jóhanna á Bergi er stjóri í Atlantic Airways. Áðrenn tað, var hon stjóri í flutningsfyritøkuni Faroe Ship. Jóhanna á Bergi varð vald í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2019, men hon sat eisini í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag, árini frá 2008 til 2014.



## Jens Meinhard Rasmussen

*Nevndarlimur*

Jens Meinhard Rasmussen er stjóri í Skansi Offshore og Smyril Line. Jens Meinhard Rasmussen er formaður í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip og nevndarlimur í International Chamber of Shipping. Jens Meinhard Rasmussen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Fróði Magnussen

*Nevndarlimur*

Fróði Magnussen er stjóri á KT-fyritøkuni Formula. Fróði Magnussen hevur verið formaður í KT-felagnum og er framvegis nevndarlimur har, umframt at vera nevndarlimur í øðrum fyritøkum og formaður í Búskaparráðnum. Fróði Magnussen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.



### Odd Eliasen
*Nevndarlimur*

Odd Eliasen er stjóri í Havsbrún og partur av samtaksleiðsluni í Bakkafrost. Odd Eliasen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



### Árni Ellefsen
*Nevndarlimur*

Árni Ellefsen er stjóri í BankNordik. Árni Ellefsen er formaður í Arbeiðsgevarafelagnum hjá Fíggjarstovnum í Føroyum umframt at vera nevndarlimur í øðrum fyritøkum. Árni Ellefsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



### Ólavur Bjarkhamar
*Nevndarlimur*

Ólavur Bjarkhamar er rakstrarleiðari hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri. Harumframt er Ólavur ein av eigarunum av Delta Seafood á Tvøroyri. Ólavur varð nývaldur í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2022, og Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir Ólavi vælkomnan í nevndina og alt tað besta frameftir við nevndararbeiðinum.

## Føroya Arbeiðsgevarafelag takkar Boga fyri tíðina í nevndini



Nevndarformaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag seinastu árini, Bogi Jacobsen, stillaði ikki uppaftur til nevndarvalið í 2022, og fór sostatt úr nevndini í fjør.

Bogi Jacobsen er stjóri í framleiðslu og útflutningsfyritøkuni Varðin Pelagic umframt reiðarínum Varðin. Bogi Jacobsen varð valdur í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2014 og til formann í 2017. Hann var formaður til í fjør, tá hann ikki stillaði uppaftur til nevndina. Føroya Arbeiðsgevarafelag fer hervið at nýta høvi til at takka Boga fyri tíðina, fyrst sum nevndarlim og síðan sum formann í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

# Vinnuhúsið

Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreinafeløgunum í Vinnuhúsinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta fatan, at tað hevur týdning at savna føroysku vinnuna, soleiðis at vinnan fær ein sterkari samleika í samfelagnum umvegis felags umboðan.

Føroya Arbeiðsgevarafelag nýtir Vinnuhúsið sum miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti.

Í Vinnuhúsinum verða bond knýtt millum leiðarar í vinnuni, bæði her heima og uttaneftir, tí Vinnuhúsið oftani er karmur um vitjanir uttaneftir.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag.

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum, men bjóðar ymsum vinnugreinafeløgunum at húsast í Vinnuhúsinum.

Í dag húsast 14 feløg undir sama takið í Vinnuhúsinum. Fimm arbeiðsgevarafeløg og nýggju vinnugreinafeløg. Harumframt leiga Føroya Reiðarafelag og Felagið Nótaskip skrivstovur í Vinnuhúsinum.

Tey fimm arbeiðsgevarafeløgini eru:

- Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Føroya Handverksmeistarafelag
- Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum
- Føroya Prentsmiðjufelag
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Sum nevnt aðrastaðni í frágreiðingini, so umboðar Føroya Arbeiðsgevarafelag hini fýra arbeiðsgevarafeløgini omanfyri, tær sokallaðu arbeiðsgevarasamskipanirnar, í sáttmálasamráðingum við fakfeløgini.

Einstøku arbeiðsgevarafeløgini arbeiða dagliga við at ráðgeva limum sínum við sáttmála- og arbeiðsmarknaðar-spurningum, umframt at leggja til rættis arbeiðsmarknaðarmál og yvirskipaðar vinnukarmar.

Tey nýggju vinnugreinafeløgini eru:

- Havnar Handverksmeistarafelag
- Havbúnaðarfelagið
- Føroya Ráfiskakeyparafelag
- Handilsvinnufelagið
- KT-felagið
- Sjóvinnufelagið
- Samskifti
- Ráðgevarafelagið
- Ferðavinnufelagið

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri akkurát teirra vinnugrein. Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

Hesi feløgini leiga skrivstovu í Vinnuhúsinum:

- Føroya Reiðarafelag
- Felagið Nótaskip

Hesi bæði feløgini eru ikki limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag ella partur av Vinnuhúsinum annars.



MEITILBERG.COM